# Stýrið vildi ikki hoyra talan um mekling við Birgir Kruse

**Stýrið fyri Nordisk Journalistcenter vrakaði áhaldandi tilboð frá Birgir Kruse um mekling í stríðnum teirra millum. Norðurlendska Ráðharraráðið kom síðani til ta niðurstøðu, at tað ikki bar til at endurvinna álitið á Birgir Kruse sum leiðara fyri stovnin, og tí mátti hann sigast úr starvi**

UPPSØGN

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Stýrið fyri Nordisk Journalistcenter (NJC) í Århus hevði mist alt álit á stjóran, og Norðurlendska Ráðharraráðið helt, at tað bar ikki til at endurvinna álitið á Birgir Kruse sum leiðara fyri stovnin.

Tí gjørdist niðurstøðan av einari fimm mánaðar langari hoyringsrundu, at stjórin fyri NJC skuldi sigast úr starvi.

Hetta fekk Birgir Kruse at vita í einum ætlanarskrivi í síðsta mánaði, sum nú er sett í verk.

– Norðurlendska Ráðharraráðið metir, at tað ber ikki til at endurskapa tað álit á teg sum leiðara fyri NJC, sum er neyðugt fyri at samstarvið millum teg og stýrið kemur at virka nóg væl, stóð at lesa í ætlanarskrivinum til uppsagda stjóran á NJC.

### Vrakaðu uppskot um mekling

Birgir Kruse og advokatur hansara, Majken Johansen, royndu fleiri ferðir at fáa semingsfundir í lag við stýrið fyri NJC, men tey áhaldandi tilboðini vóru øll vrakað.

Stýrið fyri NJC vildi ikki hoyra talan um at mekla, tí stýrið hevði gjørt greitt, at tað hevði mist alt álit á stjóranum, og varð stjórin ikki sagdur úr starvinum, fór stýrið frá.

– Norðurlendska Ráðharraráðið hevur noterað sær, at tú saman við advokati tínum fleiri ferðir hevur mælt stýrinum til, at manglandi álitið á teg kundi loysast við mekling, og Ráðharraráðið hevur eisini undir hoyringsrunduni mælt til, at mekling varð roynd.

– Men Ráðharraráðið er samt við stýrinum í, at mekling ikki hevði kunnað loyst trupulleikarnar við tí manglandi álitinum á teg sum leiðara av Nordisk Journalistcenter, stendur at lesa í ætlanarskrivinum frá Ráðharraráðnum.

### Eingin vegur aftur

Bæði stýrið fyri NJC og Norðurlendska Ráðharraráðið komu til ta niðurstøðu, at upplýsingarnar um leiðsluna hjá Birgir Kruse av NJC vóru ov tyngjandi til, at semingsfundir kundu loysa málið.

– Vit gjørdu beinanvegin greitt, at vit høvdu mist álitið á stjóranum, tá ið Ríkisgrannskoðanin kom við sínari fyrstu frágreiðing. Síðani er ein frágreiðing gjørd afturat, sum styrkir okkum í okkara niðurstøðu, sigur Lars Helge Rasch, sum stýrisformaður fyri NJC.

Tí varð eingin vegur aftur, og Birgir Kruse mátti sigast úr starvinum sum leiðari fyri NJC.

Birgir Kruse hevur seks mánaðar uppsagnartíð, og hóast hann ikki hevur verið til arbeiðis á NJC í tíðini, meðan hoyringsrundan fór fram, fekk hann løn sum vanligt.

Birgir Kruse vil framvegis ikki gera viðmerkingar til málið.

– Eg havi enn tagnarskyldu og fái tí ikki gjørt viðmerkingar, sigur Birgir Kruse við Sosialin.

# Oljufeløg hava álit á føroyskari tilbúgving




*– Í øðrum pørtum av heiminum hava oljufeløgini sína egnu tilbúgving, men í Europa er tað ikki neyðugt, tí her eru væl virkandi almennar skipanir, sum oljufeløgini síðani fáa sína egnu tilbúgving at passa til. Soleiðis er eisini í Føroyum, sigur Ben Arabo, stjóri fyri Amerada Hess í Føroyum*

*Mynd: Jan Müller*

**– Sæð úti frá er tað eingin orsøk til, at vit ikki skulu hava álit á einari føroyskari tilbúgving, sigur Ben Arabo, sum er stjóri fyri oljufelagið Amerada Hess í Føroyum**

TILBÚGVING

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Oljufeløgini, sum virka í føroyskum øki, hava gjørt sær sínar metingar av føroysku tilbúgvingini, og tey hava álit á henni.

Tað sigur Ben Arabo, sum er stjóri oljufelagið Amerada Hess í Føroyum og sum eisini er formaður fyri áhugafelagið Føroya Oljuídnaðarbólkur (FOIB).

– Sæð úti frá er tað eingin orsøk til, at vit ikki skulu hava álit á einari føroyskari tilbúgving. Tá ið oljufeløg fara í eitt nýtt øki at arbeiða, gera tey sær sína meting av tilbúgvingini, og í okkara parti av heiminum hava oljufeløgini álit á tí almennu tilbúgvingini – eisini tí føroysku, sigur Ben Arabo.

### Hava eisini egna tilbúgving

Spurnartekin vóru annars sett við føroysku tilbúgvingina í farnu viku, tá ið tað kom fram, at sjóbjargingartyrlan bíðaði í Vágum í meira enn tveir tímar, hóast farmaskipið Jøkulfell var í havsneyð norðan fyri Føroyar.

Nú skal ein óheft kanning gerast av tilburðinum, og leiðarin fyri Sjóbjargingarstøðina er fyribils farin úr starvinum.

– Eg kann einki siga um handan ítøkiliga tilburðin, tí eg kenni ikki málið nóg væl, men eg kann siga generelt, at oljufeløgini, sum arbeiða í føroyskum øki, hava álit á føroysku tilbúgvingini og Sjóbjargingarstøðini, sigur Ben Arabo.

– Í øðrum pørtum av heiminum hava oljufeløgini sína egnu tilbúgving, men í Europa er tað ikki neyðugt, tí her eru væl virkandi almennar skipanir, sum oljufeløgini síðani fáa sína egnu tilbúgving at passa til. Soleiðis er eisini í Føroyum.

### Eftirmeting er neyðug

Stjórin fyri Amerada Hess í Føroyum vil einki siga um, hvørt tað er rætt at gera eina óhefta kanning av føroysku tilbúgvingini, men hann heldur, at eftirmeting er alneyðug.

– Tað er einki galið við útgerðini hjá føroyingunum, og skipanin tykist eisini vanliga rigga væl, men eingin skipan er fullkomin, og tí er tað neyðugt við støðugari eftirmeting, sigur Ben Arabo.

## ATR heldur páskir á Kambsdali

Leygarkvøldið 19. mars verður stórur páskadansur í ítróttarhøllini á Kambsdali, har væl umtókti rockbólkurin All That Rain fer at spæla.



All That Rain hevur verið millum fremstu bólkarnar her á landi í fleiri ár, og teir gera nú aftur vart við seg í Prix Føroyar tónleikakappingini. All That Rain er ein av bólkunum, sum er komin víðari til hálvfinaluna í Prix Føroyum, og áður hava teir verið í finaluni í kappingini.

Manningin í All That Rain er broytt eitt sindur seinnu árini, men kjarnin í bólkinum er tann sama. Jens Tummas Næss spælir bass, Henning Nicodemussen trummur og Hans Ravnsfjall gittar. Seinasta hálva árið hevur Rókur Jakobsen verið sangari í bólkinum. Hann hevur áður lagt sína rødd til tónleikin hjá bólkum sum Tangz og MC Hár.

All That Rain spælir bæði sín egna rocktónleik, og teir duga sanniliga eisini at tríva í kendar sangir hjá øðrum bólkum.

Bussar koyra í sambandi við tiltakið.